

# West Hercules á Skálafjørðinum í kvøld

## West Hercules á Skálafjørðinum



**Fingu nógv fleiri uppgávur enn upprunaliga ætlað**

20:17



**Hercules gevur arbeiði til 80 fólk**

21:36



**Video: Soleiðis sá Skálafjørðurin út í gjárkvøldið**

21:18




**Myndir: West Hercules kemur inn á Runavík**

19:57

**» Fleiri**

Deil:

**Jan Müller**

19.08.2014 - 16:07

Oljan.fo

Boripallurin “West Hercules” er ávegis inn á Skálafjørðin og verður har umleið klokkan 20 í kvøld. Hann verður sigldur inn á fjørðin og lagdur fyri íla útfyri Runavíkar havn. Í løtuni siglur hann eystan fyri Nólsoynna og verður á Eystnesi um kl. 18.

Rúnavíkar havn heitir í skrivi á  á skip og bátar, sum eru í økinum, tá boripallurin fer ímillum oyggjar og um firðir, at taka atlit til støddina og manøvrumøguleikarnar hjá “West Hercules” ta løtuna, hann brúkar um at sigla av Eystnesi inn á Skálafjørðin.

Ætlandi verður “West Hercules” liggjandi á fjørðinum í nakrar vikur. Nógv umvælingararbeiði skal gerast, og nógvur flutningur verður ímillum land og boripallin hesa tíðina. Fyrstu tíðina verður serliga nógv kavaraarbeiði, tí er tað ógviliga umráðandi, at óviðkomandi bátar halda seg burtur frá virkisøkinum kring um boripallin.

**Runavíkar havn áleggur tí øllum bátum og skipum, sum ikki eru tengd at "West Hercules" og umvælingararbeiðnum, um ikki at koma nærri boripallinum enn 250 metrar. Hetta er galdandi frá komu til fráferð.**